# Bókat

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

## Á LANGBYLGJU




*Yrkingar*
*Bergur Rønne Moberg*
*Permumynd: Alexei Jawlensky*
*Mentunargrunnur Studentafelagsins*
*72 blaðsíður*
*130 krónur*

Høvundurin hevur í mong ár verið kendur sum ummælari og greinskrivari í føroyskum fjølmiðlum, og nú roynir hann seg á fyrsta sinni við einum yrkingasavni. Yrkingarnar í Á langbylgju kunnu sum heild sigast at vera eksistentialistiskar og takast við teir stóru spurningarnar í tilveruni. Saknur og sorg um tað deyðu mammuna merkir fleiri tekstir, meðan aðrir siga frá tí deyða kuldanum mótvegis tí livandi hitanum. Og so er tað sonurin, sum við sínum eygleiðingum sær.

## EYDNULOYSI

*Dokumentar*
*Grækaris Djurhuus Magnussen*
*Myndir: Magnus Magnussen*
*Forlagið Steyrin*
*299 krónur*

Í bókini Eydnuloysi hava høvundarnir í eina tíð fylgt nøkrum rúsmisnýtarum, sum í longri tíð hava havt Herbergið hjá Frelsunarherinum sum akker. "Eydnuloysi" fylgir rúsevnismisnýtarunum í gerandisdegi teirra. Heimleysu rúsevnismistnýtararnir siga frá stundum eydnuleysa lívi sínum, og vit uppliva harðbalnar lagnur. Skuggatilveran er farin illa við teimum. Og orsøkin til lívið á skuggasíðuni kann vera sprottin longu í ólukkuligum barndómi. Syndarligar vanlukkur hava eisini vent einum annars góðum lívi til at gerast eitt satt helviti. Úrslitið er ein endaleys flýggjan í rúsin.




## DÁVUR Í TJØRNUVÍK onnur bókin

*Síðsøga*
*Sveinur Ísheim Tummasson*
*Forlagið Glint*
*350 krónur*

Hetta er onnur bókin um 95 ára gamla tjørnuvíkingin Dáva Davidsen og lív hansara á sjógvi og landi. Í hesari bókini sigur Dávur eitt nú frá brúdleypi sínum, ódnarveðrinum á Suðurlandinum 1938, útróðri á Bakkafirði, grønlandstúrinum við Sonnu 1940, útróðri í Tjørnuvík undir krígnum og seinastu ferðini, sum tjørnuvíkingar gjørdu í Stapan. Hann sigur frá tíðini á Tórshavnar Skipasmiðju undir krígnum og arbeiðslívið í Reykjavík aftan á kríggið. Hann fer til Grønlands við Tinganesi trý summur, fer at sigla við týskum trolarum, og fær arbeiði á fiskavirki í Keflavík, har hann arbeiðir sum formaður í mong ár. Men í Tjørnuvík hevur hann heimstað, og hagar kemur hann altíð aftur.




## BURTUR

*Skaldsøga*
*Bergtóra Hanusardóttur*
*Perma: Ingi Joensen*
*Mentunargrunnur Studentafelagsins*
*Blaðsíður: 418*
*299 krónur*




Við skaldsøguni BURTUR eftir Bergtóru Hanusardóttur verður lesarin førdur inn í tað føroyska útisetalívið í Keypmannahavn, soleiðis sum tað var í seksti- og sjeytiárunum, tá eitt nú veitslurnar á vetri úti í Neystinum vóru ein fastur táttur í lívinum hjá føroyingum niðri.

Í fyrsta lagi varpar skaldsøgan ljós á teir krossvegir, har genta og drongur og heimlig og fremmand mentan umskarast. Fyrst valda friður og samljóð. Men munir og misskiljingar kveikja sum frá líður lív í eitt gonguverk, sum bæði tvinnar saman høvuðsættirnar í bókini og skapar eina sera dramatiska frásøgn. BURTUR, hugtakandi, spennandi og full av neyvum eygleiðingum, er uttan iva høvuðsverkið higartil hjá Bergtóru Hanusardóttur.

## SOLEIÐIS VAR EG TIL

*Barnabók 7- 10 ár*
*Katerina Janouch*
*Ingibjørg W.Kamban týddi/Mervi Lindman myndprýddi*
*Bókadeild Føroya Lærarafelags*
*56 blaðsíður*
*150 krónur*

Hvat hendir inni í búkinum á einari mammu í níggju heilar mánaðir?
Bókin snýr seg um ferðina til lívið – eina ferð øll børn hava verið, men ongin minnist...

